

Eg havi spælt móti spælarum sum Kaka, Francesco Totti og David Beckham

MARTIN BERGVOLD

LYKLASPÆLARIN

Martin Bergvold



Danski miðvallarin er tað, sum Sigfríður S. Clementsen hevur eftirlýst. Ein spælarii, sum kann verða bindiliðið millum verjuna og álopið. Riggar miðvøllurin, so er HB komið langt. Her skal tó sigast, at felagið longu í Róki av Fløtum Jespersen og Tróndi Jensen hevur spældi miðvallarar

GJØGNUMBROTIÐ

Bartal Wardum

Ungi, men kraftmikli miðverjin fær seg í ár royndan. Í løtuni er hann fyrstaval undir liðini á Jóhan Troest Davidsen. Kropsliga er hann væl fyri, men lykilin blívur at seta seg ígjøgnum móti teimum góðu áleyparunum.

VENJARIN

Sigfríður Skaale Clementsen

Hevur drúgvar royndir sum venjari í bestu deildini. Tykist vita hvat hann vil, men spurningurin er um tað er nakað, ið hópurin kann geva honum. Hann skal brúka allar snildir, um HB skal liggja heilt frammi í oddinum

MÁLIÐ

Evropa og uppreisn

Tað er ikki nokk hjá HB bara at koma í Evropa, men tað er ein stórur partur av málinum. Meir enn tað, so er málið at endurbyggja stórfelagið HB. Tey bæði tingini skulu ganga hond í hond.

EIN **FÓTBÓLTSDYSTUR** ER EIN FÓTBÓLTSDYSTUR

Hann hevur spælt móti Francesco Totti, Kaka og David Beckham í Italia. Nú er málið at fáa spælitíð í HB og vinna FM. Martin Bergvold er ein spælari við nógvum royndum og nógvum upplivingum í síni yrkisleið. Millum annað at blíva álopin, tá han spældi við Livorno

Nýggi formaðurin í HB er bragdligur, tá hann tekur orðið í HB-húsinum til tíðindafund.

– Í HB ynskja vit, at útlendsku spælararnir skulu lyfta spælið. Eg haldi ikki at eg sigi ov nógv, tá eg sigi at tað ger okkara nýggi spælari, sigur Kaj Leo Holm Johannesen.

Við hansara lið situr 33 ára gamli Martin Bergvold. Hann er skúlaður í danska stórfelagnum FCK. Hevur spælt við Livorno í Italia, har hann millum annað spældi hálvt annað ár í bestu deildini.

ÁVEGIS Í EIN MÁNAÐ

Tað hevur verið samband millum Martin Bergvold og HB í ein mánað, eftir at sáttmálin við Livorno bleiv uppsagdur.

– Eg var her fyri einum mánað síðani. Eg fekk eina góða mynd av felagnum. Tað er ikki so langt úr Danmark og øll tosa danskt. Tað ger alt lættari, sigur Martin Bergvold, sum á fyrsta sinni er í HB-troyggju.

Hann ásannar tó, at hann ikki kennir so nógv til føroyskan fótbólt.

– Sum danskari, so kennir tú altíð eitt sindur til Føroyar, men eg viðurkenni, at tað ikki er tann deildin, sum eg havi fylgt mest við í, sigur miðvallarin.

ÁLOPIN Í ITALIA

Heilt stóra tíðin hjá Martin Bergvold er, tá hann í 2007 skiftir til Livorno í Italia. Hann veit lítið um felagið, men er ikki í iva um uppgávuna. Seria A hevur nøkur av størstu nøvnunum í fótbóltsheiminum.

– Eg havi spælt móti spælarum sum Kaka, Francesco Totti og David Beckham. Tað var ein spennandi tíð og nógvar upplivingar, sum eg aldrin fari at gloyma, sigur Martin Bergvold.

– Fótbóltslívið í Italia er merk av ídnum viðhaldsfólkum. Tey fagna tær tá tað gongur væl, men eru eisini eirindaleys, tá tað gongur illa.

– Tað hendi nógv løgin og øðrvísi ting, ið tú sum danskari ikki skilur. Eitt skifti, tá vit kláraðu okkum illa møttu ídnastu áskoðararnir upp til venjing, og meddaðu áleyparanum hjá okkum ein í høvdið. Vit máttu halda til á leikvøllinum, tí vit sloppu ikki avstað. Tað var slíkt sum hendi, fortelur Martin Bergvold.

Hansara besta minni er tá Livorno í 2009 flytur upp. Tá verður liðið fagnað, sum teir hava vunnið meistaraheitið.

EIN DYSTUR ER EIN DYSTIR

Hóast hann er komin heilt úr Seriu A til Føroya, so verður motivatión ikki ein trupulleiki.

– Ein fótbóltsdystur er ein fótbóltsdystur. Um tað er ein dystur í Seriu A ella í bestu deildini í Føroyum, so eri eg til reiðar og motiveraður sum altíð. Eg havi eisini verið í fótbóltsverðini øll hesi árini og veit, at um tú slakar, so ávirkar tað avrikini, sigur Martin Bergvold og leggur afturat:

– Eg ynski at spæla nógvar dystir og vónandi kunnu vit vinna meistaraheitið, tá alt kemur til alt, sigur danski miðvallarin, sum hevur gjørt sáttmála fyri komandi kappingarár.

Ætlanin er, at hann skal verða maðurin á miðjuni, sum skal halda liðnum saman.